Valskrá Tjóðveldisfloksins:

# Eitt val millum heimastýri og at byggja land

**Við staðfestingini, at Sambandsflokkurin og sambandsveingirnir í hinum flokkunum standa til stórsigur, bjóðar Tjóveldisflokkurin seg fram til valið 20. januar sum trygdin fyri, at sjálvstýristilgongdin heldur fram í eini komandi samgongu**

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Eitt einfalt val, heldur Høgni Hoydal. – Velja fólk sjálvstýriskósini, so eru tað bara vit, sum tryggja hana. Vit eru lokomotivið, sum kann draga sambandskreftirnar í hinum flokkum, sigur hann*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Valið stendur millum sambandskósina og sjálvstýriskósina. Velja fólk sambandskósina, so merkir tað blokkstuðul, politisk stýrd vinna og heimastýri. Velja fólk hinvegin sjálvstýriskósina, so fáa vit eina tilgongd við frælsari vinnu, sosialum frambrotum og avgjørdari fíggjarstýring.

So einfalt lýsir Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, valið 20. januar. Tjóðveldisflokkurin legði fríggjamorgunin fram valskrá sína fyri fjølmiðlunum.

Skráin er í 10 punktum:

### 1. Sjálvstýriskósin

Í seks ár hevur Tjóðveldisflokkurin lagt støði undir einar sjálvstøðugar Føroyar. Búskaparligu, sosialu og vinnuligu framstigini hava ongantíð verið so stór, sum hesi árini.

Fleiri málsøki eru yvirtikin, og klárt er at yvirtaka 24 afturat. Eftir drúgvar fyrireikingar er eitt nú klárt at skipa føroyska fólkakirkju, rættarskipan og løgreglu.

Harumframt eru fyrireikingarnar til Grundlóg Føroya um at vera lidnar.

Arbeiðið við yvirtøkum og grundlóg steðgaði, tá Anfinn Kallsberg skrivaði út val.

Hvør einasta atkvøða til Tjóðveldisflokkin verður brúkt í stríðnum fyri, at yvirtøkurnar verða framdar, og Grundlóg Føroya sett í verk.

Soleiðis vil flokkurin leggja støðið undir Føroyskt fullveldi og eina framtíð, har vit á egnum beinum knýta samband við allan heimin.

### 2. Sosial frambrot

Í seks ár hevur Tjóðveldisflokkurin havt fíggjarmál.

Hesi árini er skatturin hjá tí, sum vinnur 200.000 krónur, lækkaður við 10.000 krónum. Fólkapensiónin er hækkað við 8.000 kr. fyri hjún og 12.000 kr. fyri støk. Harumframt er pensiónin gjørd skattafrí.

Barnafrádrátturin er hækkaður við 2.600 kr.

Lestrarstuðulin til heimabúgvandi er hækkaður við 8.000 króunum og fyri útibúgvandi við 11.000 krónum. Tey, sym lesa uttan fyri norðurlond, fáa harumframt upp til 120.000 kr. til skúlagjaldið í mun til 60.000 kr. fyri seks árum síðani.

Í knøpp tvey ár hevur Tjóðveldisflokkurin umsitið almannamál. Hesa tíðina er m.a. farið undir at byggja ellis- og røktarheim til 123 fólk, ein haldfør loysn er funnin á barnaansingini, og pengar eru settir av til herberg fyri heimleys.

Tað er Tjóðveldisfloksins uppgáva at prógva, at eingin verður illa fyri, tá Føroyar fáa sjálvræði. Tí verður kósin hildin komandi árini.

Næstu stigini eru at nøkta allan tørvin á ellis- og røktarheimsplássum í samstarvi við kommunurnar, at skipa nýggja, samhaldsfasta pensiónsskipan, og at byggja út barsilsskipanina.

### 3. Frælst vinnulív

Í Føroyum hava marknaðarkreftirnar hava verið settar til viks, og politikarar hava stýrt vinnuni.

Skattgjaldarin hevur verið tvingaður at rinda milliardir fyri miseydnaðar, politiskt stýrdar verkætlanir.

Tjóðveldisflokkurin vil hava eitt frælst, liberalt vinnulív. Politikarar skulu skapa vinnuni góðar karmar, men ikki stýra henni.

Hóast harða mótstøðu hevur Tjóðveldisflokkurin farnu seks árini slóðað fyri, at studningur til vinnuna er tikin burtur. Úrslitið er, at vinnan stendur á egnum beinum og kastar meira av sær enn nakrantíð áður.

Tjóðveldisflokkurin hevur júst sett á stovn føroyskan virðisbrævamarknað.

Næsta stigið er at einskilja tann stóra partin av vinnuni, sum endaði á almennum hondum undir kreppuni.

Einar frælsar Føroyar krevja eitt frælst vinnulív.

### 4. Avgjørd búskaparstýring

Tjóðveldisflokkurin hevur sitið við fíggjarmálum í seks góð ár.

Trýstið at lata slúsurnar upp hevur verið øgiligt. Men Tjóðveldisflokkurin hevur staðið ímóti og stýrt búskapinum við fastari hond.

Hesi árini hava vit goldið kontant fyri størri útbyggingar enn nakrantíð áður. Skuldin er goldin niður í helvt. Og blokkstuðulin er minkaður. Men kortini hava vit havt yvirskot hvørt einasta ár.

Tann kontanta stýringin hjá Karsten Hansen hevur ikki altíð verið væl umtókt. Men tað er henni fyri at takka, at vit í dag hava ein sunnan búskap. At vit klára eitt afturstig, uttan at enda í kreppu. Og at vit eiga nærum tvær milliardir á bók.

Sjálvræði krevur, at vit umsita okkara pengar við ábyrgd. Tjóðveldisflokkurin fer at halda somu kós komandi árini.

### 5. Miðvísar útbyggingar

Tjóðveldisflokkurin setti sær fyri 6 árum síðani sum mál, at Føroyar skuldu útbyggjast til eitt nútímans samfelag. Ætlanin hevur verið fylgd:

Vágatunnilin gjørdur. Berghol til Gásadals er gjørt. Farið er undir Norðoyartunnilin. Ferjulega í Kalsoynni er í gerð. Nýggjur Smyril er á veg. Pengar eru játtaðir til tunnilin millum Hov og Øravík. Teistin er bygdur. Nýtt Landssjúkrahús er bygt. Stór útbygging av ellis- og røktarheimum er sett í verk. Sambýli til brekað og minnisveik eru bygd. Og skúlar eru í gerð kring landið.

Landið er ongantíð útbygt so nógv, sum síðani vit settu kós móti sjálvræði. Hetta eru íløgur, sum knýta landið saman, og bøta um trivnaðin. Fyri Tjóðveldisflokkin er tað partur av stríðnum fyri sjálvræði.

Næsta stóra stig í langtíðarætlanini er at seta á Sandoyartunnilin, tá ið Norðoyartunnilin er liðugur.

### 6. Skúlar og mentan kring alt landið

Í seks ár hevur Tjóðveldisflokkurin havt ábyrgdina av menta- og skúlamálum. meira enn nakrantíð.

Almanna- og Heilsuskúli er latin upp á Tvøroyri. Farið er undir at byggja miðnámsskúla í Vági.

Pengar eru játtaðir til Lista- og ítróttarháskúla í Sandoynni, til Fiskivinnu- og havbúnaðardepil í Vestmanna, til útbygging av Tekniska Skúla í Klaksvík, og til nýggjan Tekniskan skúla, Handilsskúla og Studentaskúla í Havn.

Við hesum hevur Tjóðveldisflokkurin sameint trý av sínum endamálum: Ungdómurin skal hava góð útbúgvingartilboð, lokaløkini skulu mennast, og mentanin skal stimbrast. Hvørt øki í landinum skal hava sín depil til mentan, útbúgving og gransking.

Næsta stóra stig er at byggja miðnámsskúla í Vágum, har serligur dentur skal leggjast á ferðavinnu.

### 7. Almennnur setanarsteðgur

Tjóðveldisflokkurin var ímóti, tá føroyska miðfyrisitingin var skipað sambært uppskotinum hjá Finn Norman Christensen.

Flokkurin heldur framvegis ikki, at henda skipan hóskar til føroyska samfelagið.

Tjóðveldisflokkurin vil rationalisera og effektivisera miðfyrisitingina við at leggja deildir saman.

Setanarsteðgur skal setast í verk, so samlaða talið av størvum innan miðfyrisitingina ikki økist.

### 8. Umhvørvisrøkt

Umhvørvi er okkara týdningarmesta tilfeingi. Og tað má røkjast betur enn higartil.

Tjóðveldisflokkurin vil stuðla alternativari orkuútbygging í Føroyum, endurskoða grundarlagið hjá SEV fyri vatnorkuútbygging í Eysturoy, styrkja lokal umhvørvistiltøk, og skjóta upp fyri Norðurlandaráðnum at stovna ein altjóða granskingarstovn fyri havumhvørvi og veðurlagsbroytingar í Føroyum

### 9. Samband við allan heim

At Føroyar ikki hava fullveldi ger, at vit ikki fáa samstarvað frælst við onnur lond. Ikki ein gang fullan limaskap í Norðurlandaráðnum kunnu vit fáa, hóast eitt samt løgting ynskir hetta.

Ríkisrættarliga støðan verður ein enn størri trupulleiki, tá Danmark um stutta tíð helst fer at góðkenna nýggju ES-grundlógina. Tí so leingi Føroyar ikki hava fullveldi, kunnu vit bert fáa ES-limaskap sum ein danskur landslutur. Hesum er Tjóðveldisflokkurin hart ímóti.

Tjóðveldisflokkurin vil, at Føroyar, eins og Ísland, Noreg og Liktinstein, fáa ein EBS-sáttmála við ES. Men til tess krevst, at vit eru eitt sjálvstøðugt land.

Føroyskt fullveldi er sostatt bæði fortreytin fyri limaskapi í Norðurlandaráðnum og eini skilagóðari avtalu við ES.

Men til vit hava nátt hesum máli, vil Tjóðveldisflokkurin, har tað ber til, menna sambandið og samstarvið við øll okkara grannalond.

Stóra málið er at stovna eitt »OPEC« fyri fiskivinnutjóðirnar í Norðuratlantshavi, har vit kunnu samstarva um at fáa betri atgongd til ES uttan at gerast limir.

### 10. Mark millum rangt og rætt

Álit á politisku skipanina er ein fortreyt fyri fólkaræði.

Tí mugu landsins leiðarar taka greiða frástøðu frá lógarbrotum.

Um ein leiðandi persónur og politiski flokkur hansara í staðin verja lógarbrot, verður grundarlagið tikið undan stríðnum fyri sjálvræði.

Eitt sjálvstøðugt samfelag krevur leiðarar við tign.

Tjóðveldisflokkurin setir mark millum rangt og rætt. Og tekur avleiðingarnar, tá farið verður um hetta mark.

Fyri Høgna Hoydal og Tjóðveldisflokkin er valið 20. januar sera greitt, tí tá skal støða takast til, um vit skulu halda áfram at byggja land – ella um vit skulu venda aftur til heimastýrið.



**Tjóðveldisflokkurin fer ikki í samgongu við Fólkaflokkin, um Fólkaflokkurin ikki tekur greiða frástøðu frá lógarbrotunum hjá Anfinni Kallsberg. Tjóðveldisflokkurin vil hava eitt greitt mark millum rangt og rætt.**




*Høgni Hoydal og Tjóðveldisflokkurin ásanna, at valstríðið hesaferð verður harðari enn nakrantíð.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fólkaflokkurin má sópa fyri egnum durum

LØGTINGSVAL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Eitt av undirpunktunum í valskrá Tjóðveldisfloksins er markið millum rangt og rætt. Høgni Hoydal segði á tíðindafundinum fríggjamorgunin, at eftir valið 20 januar kemur Fólkaflokkurin ikki upp á tal sum samgongufelagið hjá Tjóðveldisflokkinum, uttan at flokkurin tekur greiða frástøðu frá lógarbrotunum hjá løgmanni.

– Fólkaflokkurin má gera upp við Anfinn, um vit skulu gera eitt møguligt samgongusamstarv við Fólkaflokkin, sigur formaður Tjóðveldisfloksins

Høgni Hoydal vísir á, at tað ber ikki til at landsins leiðarar verja lógarbrot, tí so er grundarlagi fyri fyri stríðnum fyri sjálvsræði tikið burtur. Spurdur, um hvussu langt Tjóðveldisflokkurin vil fara fyri at tryggja, at álitið á politisku skipanini verður varðveitt, svarar Høgni, at Tjóðveldisflokkurin hevur ongar ætlanir um at døma ávísar persónar, tí tað hava vit eina rættarskipan til.

– Verður eitt lógarbrot staðfest og viðkomandi persónur viðgongur lógarbroti, so má minsta krav verða, at viðkomandi ikki sigur ósatt um brotið. Tað er alneyðugt, at greið frástøðu verður tikin frá lógarbrotum, og vit í flokkinum hava tikið líknandi mál upp, tí vit meta tað er týdningarmikið, at ein tekur sjálvsábyrgd, greiðir Høgni Hoydal frá.

### Lokomotivið

Tjóðveldisflokkurin dylir ikki fyri, at løgtingsvalið 20. januar er eitt greitt val um framtíðina hjá Føroyum. Hóast valið stendur millum loysing og samband, so vil Tjóðveldisflokkurin ikki útihýsa møguleikanum fyri einum møguligum samgongusamstarvi við Sambandsflokkin.

– Vit útihýsa ikki nøkrum flokkin. Avgerandi fyri okkum er, at sjálvstýristilgongdin heldur fram. Vit vilja savna allir sjálvsstýriskreftir í landinum, og draga hinar flokkarnar við okkum á sjálvsstýriskós, sigur Høgni Hoydal.

Hann leggur afturat, at flokkurin vil arbeiða miðvíst fyri, at yvirtøkulógin verður gjøgnumførd, og at Grundlógin kemur út til fólkaatkvøðu.

*Kemur Sambandsflokkurin upp á tal?*

Vit eru lokomotivið í sjálvstýrismálum í føroyskum politikki, og Sambandsflokkurin kann koma upp á tal, men tað veldst sjálvsagt um, hvat teir vilja á sjálvstýrisleið. Sjálvsstýrismálið er framvegis alt avgerandi spurningurin hjá okkum, sigur formaður Tjóðveldisfloksins.

### Greiðan vinnupolitikk

Høgni Hoydal ásannar, at vinnupolitikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum er broyttur nakað, síðan seinasta valskeið. Hann sigur, at flokkurin hevur fyri stuttum endurskoðað stevnuskránna, og tað hevði millum annað við sær, at flokkurin hevur valt eina nýggja vinnupolitiska kós. Í valskránni tekur flokkurin frástøðu frá politisk stýrdari vinnu. Hóast trýstið fyri at lata einstøkum vinnum stuðul seinasta valskeið, hevur Tjóðveldisflokkurin havt eina greiða støðu í málunum.

Flokkurin vil fyri alt ikki enda aftur í einum politisk stýrdum vinnulívi, har vit nógvar ræðusøgur frá 80 árunum at vísa ár. Tjóðveldisflokkurin ynskir í hesum sambandi eina uppgerð millum vinnuliv og politiska myndugleikan.

- Tað er neyðugt, at vinnan fær greiðar og fastar karmar at arbeiða undir. Vit mugu fyri alt ikki enda í eini politisk stýrdari vinnu, tí politiska uppgávan er ikki at stýra vinnuni, men at geva henni karmar, sigur Høgni Hoydal

Tjóðveldisflokkurin vil í hesum sambandi eisini koma kreppuloysnunum frá fyrst í nítiárunum til lívs. Flokkurin vil virka fyri, at almennu fyritøkurnar verða einskildar. Her verður millum annað hugsað um Fiskavirking og Føroya Banka, sum bæði áttu at virka undir privatum grundarlag. Høgni Hoydal sigur seg vænta, at ein einskiljing av almennum fyritøkum hevði givið føroyska vinnulívinum nýggjan vøkstur og væl størri dynamikk.

### Hart valstríð

Tjóðveldisflokkuin ásannar, at valstríðið hesaferð verður harðari enn nakrantíð. Tað eru nógvir føroyingar sum væntað, at áhaldandi stríðið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin farna valskeiðið, møguliga verður aftur at síggja undir valstríðnum. Høgni Hoydal sigur, at ein kann altíð hava óttað fyri, at stríðið millum Tjóðveldisflokkin og Fólkaflokkin verður tikið fram og nýtt í valstríðnum, men hann vónar kortini ikki at so verður.

– Vit hava lagt eina greiða valskrá fram, og tað verður sjálvsagt eftir henni, at flokkurin fer at virka eftir í valstríðnum. Vit hava ongar ætlanir um at viðgera ávísar persónar undir valstríðnum, sigur Høgni Hoydal at enda.

# Frá loysing til sjálvbjargni

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Síðani Tjóðveldisflokkurin aftur fekk ávirkan á politisku leiðsluna í Føroyum eftir valið í 1998, hevur fullveldismálið fylt nógv – serliga fyrru árini.

Gamla slagorðið hjá Tjóðveldisflokkinum var »loysing«. Hetta orðið varð longu linkað í valstríðnum í 1998 til »skipað loysing«, sum eftir valið gjørdist til »fullveldi«.

Eftir at fólkaatkvøðan varð avlýst, og eftir at fullveldismálið ikki varð so rúgvusmikið í dagliga kjakinum, varð aftur tosað um »sjálvstýri« – og seinastu dagarnar hava vit hoyrt og sæð formann Tjóðveldisfloksins og onkran av tinglimunum við, brúkt orðið »sjálvbjargni«.

Orðið »fullveldi« er nevnt fýra ferðir í valskránni. Tað verður orðið »sjálvræði« eisini, meðan orðið »loysing« bert er at finna í teldupostadressuni hjá Tjóðveldisflokkinum, »loysing@post.olivant.fo«.